# MADAME KLETT - CONSULAT HONAIRE

**20. maj fingu vit nýggjan franskan konsul í Føroyum, eftir at Valdemar Lützen, fyrrverandi konsul, segði sessin frá sær. Fraklands nýggi konsul eitur Julianna Klett, ið varð útnevnd til heiðurskonsul fyri fronsku tjóðina. Til dagliga starvast hon sum advokatur, men er eisini trý-málsligur korrespondentur í enskum, týskum og fronskum. Tískil skuldi hon havt stak góðar fortreytir fyri at røkja nýggja starv sítt sum consulat honaire, ið er franska heitið fyri heiðurskonsul**



Tað var franski sendiharrin í Danmark, Régis de Belenet, ið stóð fyri teirri formellu setanini av nýggja konsulinum. Stórfingin móttøka varð hildin á Vertshúsinum í Tórshavn, har sendiharrin nýtti høvi til at ynskja Juliannu tillukku við nýggja sessinum. Sendiharrin vitjaði harumframt ymiskar stovnar og ymiskar embætismenn á sínari vitjan í Føroyum, og eisini fekk hann orð á Anfinn Kallsberg løgmann.

Spurd um, hví júst hon bleiv útnevnd, sigur Julianna Klett heldur lítillátin seg als ikki kenna orsøkina til hetta. Hon fortelur, at hon fekk ein fyrispurning úr Danmark í januar 2003, har hon varð spurd, um hon vildi gerast franskur konsul í Føroyum. Hesum játtaði Julianna, hóast hon ikki visti hví, hví fyrispurningurin var komin til hennara. Tó hevur Julianna stóran kunnleika til franska mentan og fronsk viðurskifti sum heild. Umframt at duga franskt, hevur Julianna eitt tíðarskeið búð í París og lisið á universitetinum í Sorbonne.

Sum konsul er tað uppgávan hjá Juliannu at umboða fronsku tjóðina og hennara áhugamál í Føroyum. Vanligu arbeiðsuppgávur hennara eru at hjálpa fransmonnum, ið eru komnir í óføri her í Føroyum. Eitt nú tá fransmenn missa passið hjá sær burtur ella søkja um visum, so er Julianna altíð fús til at hjálpa teimum. Annars vitjar Julianna eisini franskar sjómenn, ið eru vorðnir sjúkir og liggja á sjúkrahúsið uttan at hava nakran at tosa við.

## Fransarnir koma...

Tilknýtið Føroyar hava til Fraklands er fyri ein stóran part umvegis okkara fiskaútflutning, og Julianna veit um ymiskar føroyskar fyritøkur, ið hava deildir í eitt nú La Rochelle og Sur la Mére. Harumframt eru tað eisini føroysk lesandi, ið leita sær til Fraklands at nema sær útbúgving. Men líkt er til, at Føroyar koma at hava upp aftur meira at gera við fronsku tjóðina - ið hvussu so er í 90 minuttir, tí hetta er longdin á fótbóltsdystinum, ið verður Føroya og Fraklands millum. Óivað venja bæði landsliðini sera hart og nógv, men Julianna Klett fyrireikar seg sanniliga eisini og ætlar sær eisini at gera okkurt burtur úr hesum merkisvera tiltaki.

-Eg hevði gott kunnað hugsað mær at skipað fyri onkrari reseptión fyri franska liðið, tá teir koma higar, sigur Julianna Klett. Hon viðmerkir, at starvið sum konsul er ólønt og tískil má hon søkja um pening til at skipa fyri tílíkum tiltøkum. Tá ið dóttir kenda filmsleikaranum Charlie Chaplin, Victoria Chaplin, við sínum forvitnisliga "Le Cirque Invisible", hevði Julianna eisini ætlanir um at skipa fyri onkrum tiltaki, men hetta náddi hon kortini ikki. Hvørjum liði franski konsulin fer at halda við í tí komandi landsliðsdystinum, kunnu vit bert gita okkum til.

## Fyrsti kvinnuligi konsul

Julianna hevur nógvar ætlanir fyri framman og ætlar sær á ráðstevnu saman við øðrum fronskum konsulum í danska kongaríkunum. Ráðstevnan verður hildin í Keypmannahavn við einari formellari samkomu, og Julianna hevur longu fingið fyrispurning um hon vil luttaka, og hetta sigur hon seg vera sinnaða til.

At enda viðmerkir Julianna, at hon er fyrsti kvinnuligi konsulin í øllum danska kongaríkinum, og hetta ætlar hon sær at vera, so leingi hon hevur áhuga fyri tí, sigur Julianna Klett.
























